umhvørvisstovan

P/F MAGN
VIÐARNES
POSTBOX 188
110 TÓRSHAVN
Føroyar

Argir hin 20. august 2020
Málsnr.: 19/00885-23
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Katrin Haraldsdóttir Jensen

**Góðkenning av umhvørvisárinsmeting hjá P/F Magn fyri vindmyllur í Flatnahaga**

## Góðkenning og heimild

Umhvørvisstovan góðkennir, sambært §16, stk. 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 2012 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum, umhvørvisárinsmetingina hjá P/F Magn um at seta seks Enercon E-82 vindmyllur upp í Flatnahaga í Tórshavn.

## Umsókn og málsviðgerð

Umhvørvisstovan fekk tann 9. oktobur 2019 umsókn frá P/F Magn um góðkenning av umhvørvisárinsmeting av ætlan um at seta seks vindmyllur upp í Flatnahaga. Fleiri broytingar vórðu seinni gjørdar í árinsmetingini og Umhvørvisstovan fekk endaligu árinsmetingina tann 25. november 2019.

Staðsetingin av myllunum og møgulig árin av óljóði og skuggakasti, eru viðgjørd á fundum við bæði Magn og Tórshavnar kommunu. Í sambandi við hesa viðgerð fekk Umhvørvisstovan fleiri dagførd kort fyri staðseting av myllunum og samsvarandi útrokningar fyri óljóð og skuggakast.

## Lýsing av verkætlan

Magn ætlar at seta seks vindmyllur upp í Flatnahaga. Talan er um Enercon-vindmyllur (E-82) upp á 3,0 MW hvør, samanlagt 18 MW. Hæddin á torninum er 78 m, tvørmátið á veingjunum er 82 m, og samlaða hæddin sostatt 119 m. E-82 vindmyllurnar eru framleiddar og góðkendar til strangasta vindklassa (IEC windclass Ia). Tær eru eisini bygdar og settar saman soleiðis, at tær lúka íbindingartreytirnar hjá SEV. Vindmyllurnar kunnu framleiða orku, tá ið vindferðin er millum 2,5 m/sek og 34 m/sek. Ætlanin er at binda í verandi háspenningskervið hjá SEV á Húsareyni.

Vindmyllurnar fara eftir ætlanini at standa í Flatnahaga vestan fyri Oyggjarvegin, meðan vindmyllurnar hjá SEV eru í Húsahaga, eystan fyri Oyggjarvegin, tætt við stóru mastrina á Húsareyni. Vindmátingar eru gjørdar á Húsareyni seinastu 8 árini, og sostatt eru vindviðurskiftini í økinum væl kend. Hesar mátingar vísa, at miðal vindferðin liggur um 10 m/sek, og mesti vindurin er vanliga undir 34 m/sek, tó eru mátingar gjørdar har vindferðin var upp í 50 m/sek.

Vindmyllurnar verða eftir ætlan settar soleiðis, at tær gagnnýta tær ráðandi ættirnar á staðnum á besta hátt. Vegir og fundament verða løgd soleiðis, at tey fella best møguligt inn í verandi lendi. Vegurin verður fýra metrar breiður og samlaða vegalongdin 1.750 metrar. Bundið verður í Oyggjarvegin áleið 450 metrar norðan fyri avkoyringina til mastrarnar á Bøllureyni. Økið, ið er lagt av til verkætlanina, er 500.000 m$^2$, og væntandi verða 28.000 m$^2$ brúktir til vindorkuvirksemið.

## Umhvørvisárinsmeting

Umhvørvisárinsmetingin frá P/F Magn viðger hvørji árin verkætlanin kann hava á náttúru og umhvørvi. Ein óheft frágreiðing um "*Lívfrøðiliga margfeldi í Flatnahaga og Hoyvíkshaga, 01-02-2019*" er gjørd, har mett verður um ávirkan á djóra- og plantulív. Átøk fyri at verja serligar plantur og djór verða eisini viðgjørd. Hugt verður eftir, hvussu vindmyllurnar síggjast í landslagnum, og mett verður um vindmyllurnar fara at elva til ampar orsakað av óljóði, skuggakasti og endurskini.

Í Flatnahaga eru fleiri ymisk lendissløg. Har eru grøn øki við samanhangandi vøkstri, av hesum eru bæði heiðalendi og vátlendi. Fleiri berligar eyrfløtur eru eisini í økinum og harumframt eru í støðum blettir við gróti og hellu. Økið liggur í umleið 300 metra hædd.

Í Flatnahaga eru nógv ymisk plantusløg, og tey ymisku lendissløgini hava skiftandi sløg av plantuvøkstri. Nógv er til av flestu sløgum, øll uttan eitt plantuslag eru skrásett sum *sera vanlig og vanlig*. Einasta slagið, sum er skrásett *her og har*, er tríagnað sev, *Juncus triglumis*.

Lendið hýsir eisini væl av skordjórum og øðrum smádjórum. Sjey sløg av svartaklukku eru funnin. Av tí at lendið í Flatnahaga skiftir millum vátligt, berligt og heiðalendi, er ymiskt hvørjar klukkur eru ráðandi, og hvussu nógvar tær eru. Øll svartaklukkusløgini eru vanlig í Føroyum.

Fýra sløg av fugli reiðrast í Flatnahaga, tey eru tjaldur, lógv, likka og steinstólpa. Á føroyska reyðlistanum er steinstólpa mett sum *nærum hótt* og lógv er mett sum *viðbrekin*. Orsøkin til hetta er, at búfjøldin er lítil og minkar. Hesir fuglar hava ymiskan tørv til búpláss, og av tí at tað eru fleiri lendissløg í Flatnahaga, er pláss til tey ymisku búfuglasløgini. Einans eitt par av hvørjum slag átti í Flatnahaga. Tað eru tekin um nógva ferðslu í haganum, bæði við tveimum og fýra hjólum, og er hetta møguliga orsøkin til vantandi nøgd av búfugli.

Í árinsmetingini vísa útrokningar, at óljóðið frá vindmyllunum er niðan fyri markvirðini í verandi bústaðarøkjum. Tó vísa útrokningarnar, at óljóðið er omanfyri galdandi markvirði í ávísum økjum, sum eru ætlað til bústaðarøki og frítíðarendamál, í byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu. Tað er eingin vandi er fyri skuggakasti í bústaðarøkjum. Mett verður ikki, at skuggakast fer at órógva ferðsluna á Oyggjarvegnum, hóast skuggakast kann koma fyri har. Harumframt verður ikki mett, at nakar ampi verður av endurskini frá vindmyllunum. Vindmyllurnar verða viðgjørdar við serligari "anti-reflektivari" máling, og veingirnir eru rundaðir soleiðis, at hetta eisini minkar um endurskin.

## Viðgerð

Vindmyllur kunnu hava ymisk neilig árin á fugl. Hesi árin kunnu vera vegna ljóðdálking, beinleiðis skaði vegna samanstoyt, mist lendi og órógv orsakað av byggivirksemi og øktari ferðslu. Kanningar úr Bretlandi og Noreg hava millum annað víst, at talið av lógv og steinstólpu kann minka tætt við vindmyllur. Harafturímóti vísa fuglateljingar í Neshaga í 2011 og 2014, at steinstólpa reiðrast tætt við vindmyllurnar. Tjøldur eru mett at vera harðbalnari, og flyta seg ikki eins lætt vegna órógv. Harafturat

benda teljingar í Húsahaga í 2017 á, at fuglatalið ikki minkar samanborið við kanningar, ið vórðu gjørdar í 2013-2014, áðrenn vindmyllur vórðu settar upp.

Sum áður nevnt vísa útrokningar, at óljóðið er oman fyri galdandi markvirði í ávísum økjum, sum eru ætlað til bústaðarøki og frítíðarendamál sambært byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu. Talan er um trý ymisk øki. Øki A1, sum er lagt út til lága bústaðarbygging, øki D1, sum er lagt út til frílendi og øki D2, sum er lagt út til ítróttarøki. Øki A1 er niðan fyri Oyggjarvegin og øki D1 og D2 eru í Havnardali.

Umhvørvisstovan gjørdi á fundi við Tórshavnar býráð tann 29. apríl 2020 vart við, at ávís øki, sum sambært byggisamtyktini eru løgd av til bústaðarøki og frítíðarendamál, kunnu verða ávirkað av óljóði frá ætlaðu vindmyllunum í Flatnahaga.

Býráðið viðgjørdi á býráðsfundi 28. mai 2020 serstøku byggisamtyktina fyri vindmyllur í Flatnahaga og í hesum sambandi varð øki A1 eisini viðgjørt. Her verður sagt, at kommunan ikki hevur ítøkiligar ætlanin um at byggja bústaðir á øki A1, men tað er ikki óhugsandi at tað verður bygt á økinum innan 20 ár. Partur av treytunum í avtaluni við Magn er, at vindmyllurnar verða burturbeindar aftaná 20 ár. Býráðið mælir til at ljóðmátingar verða gjørdar í øki A1, tá ið vindmyllurnar eru virknar, og at frávik verður givið umsøkjara at halda ásettu ljóðkrøvini fyri økið A1.

Eingin viðgerð var av øki D1 og D2 á býráðsfundinum, og í hesum sambandi hevur Umhvørvisstovan havt fund við umboð frá Tórshavnar kommunu tann 19. juni 2020. Umhvørvisstovan gjørdi vart við, at í øki D1 og D2 í Havnardali verður óljóðið frá vindmyllunum í Flatnahaga væl oman fyri markvirðini, sum Umhvørvisstovan metir skulu vera fyri ljóðviðkvom øki. Sambært nýggjastu ljóðkortunum verður ljóðstyrkin, tá ið vindferðin er 8 m/s, oman fyri 44 dB(A) í vestara parti á D1 og annars millum 39 og 44 dB(A) á eystar parti. Á D2 verður ljóðstyrkin umleið 39 dB(A).

Økini D1 og D2 eru sum nevnt ætlað til frítíðarendamál, og kunnu øki sum eru ætlað til frítíðarendamál verða bólkað sum antin ljóðviðkvom ella ikki. Tað er kommunan sum í byggisamtyktini avgerð hvussu øki eru bólkað. Í byggisamtyktini eru ongar ásetingar um ljóð á D1 ella D2 økjum. Øki til ítróttarendamál verða vanliga ikki mett at verða ljóðviðkvom. Harafturímóti eru frílendi, eitt nú viðarlundir o.t., ofta eyðmerkt sum ljóðviðkvom øki.

Í skrivi, sum varð sent til Tórshavnar kommunu hin 26. juni 2020, heitti Umhvørvisstovan á kommununa um at staðfesta um øki D1 í Havnardali skal metast sum ljóðviðkvæmt. Byggi- og býðarskipanarnevndin hjá Tórshavnar kommunu viðgjørdi fyrispurningin hin 6. august 2020, og hevur svarað fyrispurninginum frá Umhvørvisstovuni. Umhvørvisstovan tulkar svarið soleiðis, at kommunan ikki metir D1 økið í Havnardali at vera ljóðviðkvæmt.

Samanumtikið verður ikki mett, at vindmyllurnar verða til ampa vegna skuggakast ella endurskin. Heldur ikki verður mett, at óljóð verður til ampa á núverandi bústaðarøkjum. Tó er møguleiki fyri ampum av óljóði í parti av øki, sum er lagt út til bústaðarendamál niðan fyri Oyggjarvegin og í tveimum økjum í Havnardali, sum eru løgd út til ávikavist frítíðar- og ítróttarendamál. Sambært kommunui verður helst ikki bygt í øki A1 innan 20 ár og óljóðsmátingar verða gjørdar í økinum, tá ið myllurnar eru virknar. Tískil verður undantak givið, at halda markvirðini í hesum økinum. Viðvíkjandi øki D1, hevur kommunan viðmælt at øki ikki skal viðgerast sum ljóðviðkvæmt og tí eru markvirðini fyri óljóð ikki galdandi í hesum øki. Somuleiðis er øki D2 ikki mett at verða at vera ljóðviðkvæmt.

Vindmyllurnar verða sjónligar frá Hotell Føroyum, frá ymsastaðni á Argjum, á Norðasta Horni og tær verða eisini sera sjónskar í Havnardali. Planturnar og skordýrini í økinum vóru øll vanlig í Føroyum og ikki hótt. Vindmyllurnar kunnu møguliga ávirka fugl, men lítið av fugli er í økinum frammanundan.

Fyri at tryggja, at óljóð frá vindmyllunum ikki fer at ávirka bústaðir, fer Umhvørvisstovan at heita á Tórshavnar kommunu um at broyta byggisamtyktina fyri tann partin av A1 bústaðarøkinum niðan fyri Oyggjarvegin, sum kann væntast av verða ávirkað av óljóði.

## Hoyring

Tann 20. novembur 2019 varð umhvørvisárinsmetingin send til almenna hoyring við lýsing í blaði, borið í hvørt hús, og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Freistin at koma við hoyringarsvari var 18. desembur 2019.

Umhvørvisstovan hevði ongar viðmerkingar fingið, tá freistin var farin, men fekk tó nakrar viðmerkingar, áðrenn viðgerðin byrjaði.

Uppskot til góðkenning varð sent P/F Magn og Tórshavnar kommunu til viðmerkingar hin 13. august 2020.

P/F Magn hevði ongar viðmerkingar.

Tórshavnar kommuna hevði ongar viðmerkingar.

## Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá P/F Magn frá november 2019, um at seta seks Enercon E-82 vindmyllur í Flatnahaga.

Treytin fyri hesa góðkenning er, at verkætlanin verður framd, sum greitt er frá í umhvørvisárinsmetingini og upplýsingum, sum eru komnar seinni.

Harumframt verður sett sett sum treyt, at

- Magn skipar fyri, at fuglur og vøkstur verða órógva minst møguligt, meðan arbeitt verður. Magn sendir Umhvørvisstovuni eina ætlan um hvussu hetta verður gjørt, áðrenn arbeiði byrjar.

- at Magn skipar fyri fuglateljingum, so at fylgjast kann við gongdini hjá fugli í økinum. Fuglateljingarnar verða framdar við tvey ára millumbilum í átta ár eftir at vindmyllurnar eru tiknar í brúk. Magn sendur Umhvørvisstovuni eina ætlan um, hvussu hetta verður gjørt, í seinasta lagi eitt ár fyri fyrstu teljing,

- at Magn leggur byggivirksemið soleiðis til rættis, at tað í mest møguligan mun ikki verður gjørt í bútíðini hjá fugli í økinum.

**Eftirlit**

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar.

**Kæra**

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakungjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 18. september 2020.

/

Suni Petersen, deildarleiðari

Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri